VB-TB:

# Báðir partar hava ilt við at fáa mál

**Tvørámenn ætla sær í hvussu so er at halda tørn um tað, sum teir hava, tá ið teir fara at vitja VB, sum hevur trupulleikar frammi á vøllinum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Nullloysn. Tað er ikki so lítið sannlíkt, at tað kann gerast úrslitið, tá ið tann fyrsta av trimum uppgerðum millum tey bæði feløgini í Suðuroy í bestu deildini verður á skránni í kvøld. 17. juli skal TB aftur til Vágs. Tað verður í 17. umfarinum, og vágbingar skulu norður á Tvøroyri í 26. og næstsíðsta umfarinum, sum verður á skránni 16. oktober.

Nógv kann broytast inntil eina ferð í oktober. Útgangsstøðan undan fyrstu lokaluppgerðini í ár er tann, at bæði liðini liggja stutt frá niðurflytingarstrikuni. Og higartil hava báðir partar havt ilt við at skjóta mál, meðan tað sum heild hevur hilnast betri í verjupartinum.

- Hjá okkum er talan um tveir sera týdningarmiklar dystir, nú vit fyrst fara til Vágs og mánadagin fara at fáa vitjan av GÍ, sum er aftast, sigur TB veteranurin Jón Johannesen.

Eingin ivi er um, at TB fer fyrst og fremst at dúva upp á verjupartin í kvøld. Frammi á vøllinum hava teir verið tunnir higartil. Men nú fáa teir styrk í framrættaða partinum. Miðvallarin Alexander Jovevic er tøkur aftur, eftir at hann leingi hevur verið skaddur, og Bárður Dimon, sum hevur verið uttanlands tað, sum er farið av hesum kappingarárinum, er aftur á Tvøroyri. Tá ið vit frættu, roknaðu teir við, at hann fór at vera við í kvøld.

Hjá vágbingum hevur gingið syndarliga illa við málskjótingini. Sunnudagin høvdu teir fleiri møguleikar í Runavík, og tað tóktist síggja ljóst út, tá ið teir eftir fínt álop løgdu seg á odda. VB tapti stórt, men skal nakar glotti finnast, so má tað vera, at teir í 1. hálvleiki megnaðu at spæla seg til fleiri møguleikar, og teir siga sjálvir, at spælið fyrru trý korterini var betri, enn tað hevur verið frammanundan. Trækarmurin og Jens Martin Knudsen vóru teimum ov boysin. Í kvøld fer ein annar sera stinnur málverji at royna at halda mótstøðumálið tætt, tá ið fyrrverandi VB venjarin, Milan Milanovic, sum tvørámenn halda heilt nógv av, aftur fer at vitja á Vágseiði.

- Tað er alneyðugt hjá okkum í álopsspælinum at gera alt annað enn at oysa høgar bóltar í høvdið á Óla Johannesen og Aca, siga teir í Vági, og so fæst at síggja, um TB og VB í kvøld fara at fáa rættuligt glið á málskjótingina.

TB hevur ikki fingið fult í Vági síðani í 1993, tá ið teir vunnu ruddulig-an 3-0 sigur.

Tað gongur væl betri við málskjótingini á næstbesta liðnum hjá samansetta VB og Sumba. Leygardagin vann liðið, sum eitur Sumba, 8-4 á heimavølli móti teimum næstbestu hjá GÍ.



GÍ-NSÍ:

# NSÍ á kambinum og GÍ í dalinum

**Men hóast munurin er stórur á stigatalvuni, so rokna teir í NSÍ við ógvuliga torførari avbjóðing, tá ið teir fara til Gøtu**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í kvøld verður oyggjauppgerð í Gøtu. NSÍ fer at vitja, og harvið er lagt upp til spennandi lokaluppgerð. GÍ og NSÍ hava seinnu árini mangan stríðst móti hvørjum øðrum í steypakappingini og landskappingini, og tað hevur oftast verið ógvuliga tætt. Eisini tá ið fjarstøðan millum liðini á støðutalvuni hevur verið stór.

- Eg eri sera væl nøgdur við gongdina seinastu vikurnar. Men hóast GÍ er niðast á støðutalvuni, so rokni eg við ógvuliga torførari uppgávu. Kanska tí mest torføru higartil í ár, sigur NSÍ venjarin Trygvi Mortensen.

Hann hevur rættuliga gjørt hol í sjógvin í Runavík. Eitt er, at lyklaspælarar sum t. d. Helgi L. Petersen, Brynjolvur Nielsen og ikki minst toppskjúttin Christian Høgni Jacobsen eru væl fyri. Eitt annað og ikki minni týdningarmikið er tað, at venjarin rættuliga er farin undir ættarliðsskifti, og at tað samstundis hilnast væl. Andy Olsen og Jústinus R. Hansen eru nú fastir menn á liðnum. Einar Hansen var millum teir fyrstu ellivu móti VB, og tveir aðrir unglingaspælarar eru komnir á vøllin seinastu ferðirnar. Teir eru Debus Danielsen og Hjalmar Dalbúð, sum skoraði síðsta málið í rimmar 5-1 sigrinum á VB.

Í Gøtu hevur fótbóltslagið onkuntíð verið betri, enn tað er nú. Men teir royna at síggja tað positiva í tí, hóast úrtøkan hevur verið soltin. Í Gundadali sunnudagin hekk spælið væl saman. Hevði B36 ikki havt framúr skarandi Jákup Mikkelsen millum stólparnar, so hevði møguleikin ikki verið so lítil fyri, at GÍ kundi havt fingið úrtøku. Higartil í ár hava gøtumenn bara vunnið í Vági. Men avrikini móti Skála í fjórðingsfinaluni og í Gundadali móti B36 hava givið optimismu.

- Vit mugu sleppa undan at gera persónlig mistøk í verjupartinum, so rokni eg við, at stigini fara at koma, hevur Krzystof Popczynski sagt.

# Hagtølini

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-EB/S | 2-2 | 4-1 | 3-1 | 0-4 | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 9-8 |
| HB-ÍF | 4-2 | - | - | - | - | 4-0 | 3-2 | 3-3 | 5-0 | - | 4-1-0 | 19-7 |
| VB-TB | - | - | 6-1 | - | - | - | 0-0 | - | 1-0 | 4-1 | 4-1-0 | 11-2 |
| GÍ-NSÍ | 1-1 | 1-1 | 0-2 | 0-1 | 1-0 | 1-3 | 5-1 | 2-0 | - | 5-1 | 4-2-3 | 16-10 |
| Skála-B36 | 2-0 | 0-1 | 1-1 | - | - | - | - | - | - | - | 1-1-1 | 3-2 |

*Tað eru serliga HB og VB, sum hava hagtølini við sær, tá tosast skal um dystirnar mikukvøldið. Hvørgin av hesum hava seinastu tíggju tapt á heimavølli fyri mótstøðuliðunum mikukvøldið, og í báðum førum hevur talan verið um fýra sigrar og ein javnleik seinasta. Í aðrar mátar tykist talan vera um javnar uppgerðir. KÍ hevur havt eina lítla yvirvág móti EB/Streymi, og í Gøtu hevur NSÍ staðið seg heilt væl seinnu árini. Størsti spenningurin er tó kanska um dystin á Skála, og sambært hagtølunum, so verður eisini talan um spennandi dyst – tó at hesin kann gerast málfátækur. Eitt eru tó hagtølini. Annað er, at tað er á vøllinum mikukvøldið, at dystirnir verða avgjørdir, og úrslitið av hesum fáa vit so ikki at vita fyrr enn til ta tíð. Talvan sýnir, hvussu úrslitini hava verið seinastu tíggju árini, tá mótstøðuliðini mikukvøldið hava hitst í tilsvarandi uppgerðunum.*

*-jm*